# Norðborg tekniskan royndartúr í aðru viku



**- Okkara ynski er, at myndugleikarnir í Føroyum taka hædd fyri, at vit royna at menna og útbyggja okkum á einum øki sum ger, at vit kunnu fáa meira burtur úr okkara tilfeingi – eisini einum minkandi svartkjaftatilfeingi, sigur Kristian Martin Rasmussen, reiðari**

NÝBYGNINGUR
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Jón Rasmussen í Klaksvík er júst komin heim aftur úr Chili, har seinasta hond nú verður løgd á stásiligа nýbygningin, sum kemur í føroyska fiskiskipaflotan fyri gomlu Norðborg.

Hann hevur verið har yvir í heilar tríggjar mánaðir út í eitt, og okkurt skifti hevur hann eisini havt familju sína har yviri.

Saman við beiggja sínum Boga, eru tað teir báðir, sum eru skiparar. Pápin, Kristian Martin, er eisini umborð onkran túr.

## Dregur út

Jón Rasmussen sigur, at Norðborg, sum verður navnið á nýbygninginum, ætlandi skuldi tekniskan royndartúr fyri jól, men ymiskir trupulleikar stungu seg upp – og síðan komu jólini ímillum, og millum jóla og nýggjárs verður ikki arbeitt á skipasmiðjuni í Chili.

Hann sigur, at tað vóru onkrir lutir, sum skuldu fáast til vega, eitt nú til instalatiónir, sum ikki virkaðu, sum tær skuldu, og tað tekur tíð at fáa slíkar lutir allan vegin úr Evropa til Chili.

- Royndartúrurin, sum skuldi verða fyri jól, verður tí ætlandi í aðru viku, sigur Jón.

Tveir maskinmenn hjá føroyska reiðarínum eru í Chili, og um ikki so langa tí, fara tveir maskinmenn aftrat yvir hagar.

Skiparin sigur, at tað, sum eftir er at gera, er nakað av sandblásing og máling av skipinum.

- Um eina viku fara danskir servisumenn yvir til Chili at gera ymiskt klárt, og tá verða eisini ymiskar skipanir, eitt nú ventilatiónsskipanir, startaðar upp, sigur Jón Rasmussen.

Kristian Martin Rasmussen sigur, at nýggjur dagur til levering av skipinum í Chili er ásettur til at vera 24. februar, men reiðarin væntar ikki, at hetta fer at halda.

- Chilenar hava sagt, at skal hesin dagurin halda, skal alt ganga væl, og eingir trupulleikar skulu stinga seg upp. Eg vænti tí heldur, at nýbygningurin verður latin um hálvan mars.

Hann leggur aftrat, at chilenar hava gjørt og gera eitt dygdargott arbeiði, men hetta hevur ikki gingið so skjótt, sum ynskiligt var.



*Norðborg er ein ordiligur risi, og skrúvan er nógv størri enn ein maður. – Hetta verður eitt sera gott skip, sigur reiðarin, Kristian Martin Rasmussen*

- Nú skipið væntandi verður klárt til levering um hálvan mars, er nýbygningurin seinkaður í umleið eitt hálvt ár. Vit skulu helst hava skipið í fleiri ár, so vit gleða okkum í fyrsta lagi til at fáa eitt gott skip – heldur enn eitt skip, ið verður latið til tíðina, leggur Kristian Martin aftrat.

## Tvey skip

Sum kunnugt hevur felagið í Klaksvík selt Christian í Grótinum til Peru, men felagið eigur framvegis loyvi hjá skipinum.

- Vit hava soleiðis tvey loyvir, og ætlanin er frameftir at hava tvey skip.

Kristian Martin sigur, at gamla verksmiðjuskipið Norðborg fer úr flotanum, men felagið fer við tíðini at leita eftir einum øðrum skipi.

- Nú skulu vit fyrst fáa nýbygningin heim – og fáa hesa verkætlanina at virka, soleiðis sum vit ynskja tað. Tá nýggja Norðborg er komin í gongd, fara vit at hyggja uppá, hvussu vit skulu skipa okkum í okkara næstu verkætlan, sum er tað loyvi, ið eftir er.

Reiðarin sigur, at teir ikki hava læst seg fastar í, um talan verður um eitt vanligt nótaskip ella eitt verksmiðjuskip aftrat.

- Hetta koma vit at taka støðu til, tá tann tíðin kemur, leggur hann aftrat.

Kristian Martin Rasmussen sigur, at í løtuni er kanska ikki so lætt at fáa hendur á einum væl egnaðum skipi, men hann væntar, at okkurt skip verður at finna, tá tann tíðin kemur, helst seinni í hesum árinum.

Spurdur, um felagið hevur gjørt av, at nýbygningurin fær navnið Norðborg, váttar hann, at so er.

- Jú, vit hava valt at kalla nýbygningin Norðborg, og hetta er partvís av praktisk-